| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 01. februar 2008 |
| Býráðsfundur nr. | 01/2008 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Marin Sólheim Thomsen |
| | |

Ár 2008 tann 01. februar kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 25. januar 2008 um innkalling til fundar. Vegna veður, er hetta tó ein útsettur fundur frá 31. januar 2008.

**Møtt:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Signar á Brúnni
Súsanna Gaard

Súsanna Gaard møtti sum varalimur fyri Jón N. Olsen, sum yvir T-Post tann 29. januar 2008, hevur fráboðað skrivstovuni, at hann ikki møtir á fundinum, og ynskir at varalimurin tekur sætið sína vegna.

Petur Abrahamsen møtti ikki á fundi.

Signar á Brúnni fór av fundi kl. 17,30.

Skrivari: Marin Sólheim Thomsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 01/2008. Jnr. 2008-0011-0023.**
**Mál viðv. roknskapinum hjá Fuglafjarðar bókasavni fyri 2007.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, dagfest 24. januar 2008 saman við grannskoðaðum roknskapi og grannskoðarafrágreiðing fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2007.

Roknskapurin vísir, at samlaðu útreiðslurnar hava verið kr. 612.023 móti mettum kr. 630.520. Sostatt eru kr. 18.497 minni nýttar enn mett. Lønirnar hava verið kr. 49.907 lægri enn mett, húsaútreiðslurnar kr. 34.479 hægri enn mett, bókakeyp og innbinding kr. 17.687 hægri enn mett. Aðrar útreiðslur hava verið kr. 20.000 lægri enn mett.

Inntøkurnar hava verið kr. 184.000,00 í Landskassastuðli meðan kommunan hevur borðið restina av kostnaðinum, t.e. 428.000.

Bókasavnslógin heimilar upp til 40% í stuðli av eini góðkendari rakstraræltan. Stuðulin verður inntøkuførdur tað árið, hann er játtaður, eftir rakstraræltanini fyri árið eftir. T.v.s. at rakstrarstuðulin sum er inntøkuførdur í 2007 er grundaður á rakstraræltanina fyri

2008. Samb. rakstraræltlanina fyri 2008 verður roknað við einum kostnaði upp á kr. 665.736 at reka bókasavnið.

Soleiðis skuldi Landskassastuðulin verði kr. 266.294, men samb. skriv frá Føroya Landsbókasavni dagf. 9. mars 2007, verða bert kr. 460.000 góðkendar sum útgjaldsgrundarlag, sum so gevur kommununi kr. 184.000.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 25. januar 2008, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2007 uttan viðmerkingar.

**Avgerð: mál nr. 01/2008. Jnr. 2008-0011-0023.**
Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 01. februar 2008 og varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini frá 25. januar 2008 at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2007 uttan viðmerking. (8-0).

**Mál nr. 02/2008. Jnr. 2007-0042-0059.**
**Mál viðvíkjandi umsókn um byggiloyvi til uppíbygging av sethúsunum á matr. Nr. 557a.**
Rói Eliasen hevur verið á skrivstovuni við tekningum og umsókn um byggiloyvið 17.01.08
Umsóknin hevur verið til viðgerðar á fundi hjá Teknisku nevnd 23.01.08.

Niðurstøða:
Mælt verður til at umsóknin verður gingin á møtið soleiðis, at veggurin móti vegnum Brúgv ikki kemur inn á vegøkið og verður gjørdur soleiðis, at hann tolir týstið frá vegnum, og verður gjørdur beinan vegin sum útgrivið er, so arbeiðið órógvar ferðsluna niðan í Garð sum minst.
Víst verður til plantekning frá teknisku deild.
Treytirnar í Almennu Byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og Kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríðum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m.
Útgrevstrar og planeringsarbeiðið skal verða gjørt soleiðis at vegir ikki verða skaddir, og einki tilfar frá útgrevstrinum verður sløtt eftir vegunum, og á landsvegin, har moldin verður løgd á Kambsdali.
Um hetta kemur fyri, skal hetta verða tikið upp beinanvegin, og møguligir skaðar verða umvældir.

Húsini skulu verða sett av Teknisku deild.
Byggiloyvið er galdandi 2 ár frá ústkrivingardegnum.

**Avgerð: mál nr. 02/2008. Jnr. 2007-0042-0059.**
Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 01. februar 2008 og varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevndini frá 23. januar 2008. (8-0).

**Mál nr. 03/2008. Jnr. 2008-0004-0026.**
**Mál viðv. uppskoti um at seta parkeringsvørð í Fuglafirði.**

Soljóðandi skriv er komið úr Ferðslunevndini.

Á fundi hjá ferðslunevndini 15.01.08 , mælir meirilutin í nevndini til, at Fuglafjarðar kommuna setur parkeringsvørð.

Minnilutin, Kritian Martin Joensen metir, at sum støðan er, er ikki tørvur á parkeringsvørði, men at ætlanin viðvíkjandi fleiri parkeringsplássum verður gjøgnumførd, og at skeltingin verður dagførd.

Máli hevur verið fyri á fíggjarnevndarfundi tann 25. januar 2008. Nevndin mælir til, at í fyrstu syftu verður parkeringsvarðastarvið røkt av einum av okkara starvsfólki. Kommunan skal útvegað sær heimild at krevja upp bøtur, og at eyðkennisbúni verður keyptur til endamálið.
Ætlanin verður sett í verk skjótast gjørligt.

**Avgerð: mál nr. 03/2008. Jnr. 2008-0004-0026.**
Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 01. februar 2008, og varð samtykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini frá 25. januar 2008. (8-0)

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.30.

Jann Toftegaard

Dánjal Vang

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Tórfríður Abrahamsen

Súsanna Gaard

Signar á Brúnni

Sigurð S. Simonsen Skrivari: Marin Sólheim Thomsen